gult20 cyan20 magenta20 svart20

Alt er klárt

Sunnudagin hevði ÍSF kunnandi fund við sersambondini, sum hava umboð á Oyggjaleikunum, og har vórðu seinastu smálutirnir fingnir upp á pláss

OYGGJALEIKIR
Jákup Mørk

Heldur fyrivarin enn eftirsnarin, sigur orðatakið, og tað var allar helst eisini hetta, sum lá aftanfyri, tá ÍSF beyð til fundar sunnudagin.

Luttakararnir á fundinum vóru umboð fyri tær ítróttagreinar, sum eru við á Oyggjaleikunum, umframt at fjølmiðlarnir eisini vórðu boðsendir.

Eftir at øll fyrst høvdu fingið venjingarbúnar og annað til ferðina útlutaðar, sessaðust øll við borðið, og síðani greiddu umboðini hjá ÍSF frá teimum lutum, sum kunnu gera seg galdandi á ferðini.

Kannið tryggingina

Umframt at luttakararnir vórðu kunnaðir um fráferð, bústað og onnur praktisk viðurskifti, so mundi mest áhugaverdi – og helst eisini mest neyðugi - parturin verða, tá tosið fall inn á tryggingarviðurskifti og viðurskifti um sjúku.

Viðvíkjandi tryggingarviðurskiftum varð sagt, at deildarsambondini høvdu ábyrgd av, at íðkararnir vóru nóg væl tryggjaðir. Viðvíkjandi teimum, sum hava eitt arbeiði at gera á ferðini, er støðan eitt sindur øðrvísi. Her er nevnliga neyðugt við serstakari trygging, sum eisini fevnir um tilburðir, sum kunnu íkoma í arbeiðsørindum.

Harumframt varð gjørt vart við, at tað eru ávísar umstøður, sum kunnu viðføra, at tryggingin ikki tekur við, um okkurt skuldi borist at. Eitt nú varð nevnt, at um skaði hendir, og tryggingarfelagið kann ávísa, at talan ikki er um nakað nýtt fyribrigdi, kann hetta viðføra, at tryggingin ikki tekur við.

Yvirhøvur tykjast ráðini hesum viðvíkjandi at vera, at tryggingarskjøllini verða gjøgnumgingin undan fráferðini, soleiðis at greitt er, nær tryggingin tekur við - og ikki minst nær hon ikki tekur við.

Heilivágur

Eftir at greitt frá tryggingarviðurskiftunum, fekk læknin hjá ÍSF, Sølvi Winther Olsen, orðið.

Fyrst greiddi hann frá teimum dopingreglum, sum vanliga eru galdandi á Oyggjaleikunum. Hvussu tú kanst fáa lista yvir ólóglig evni, hvussu leiðararnir eiga at bera seg at, um onkur íðkari tekur medisin o.s.fr.

Viðvíkjandi heilivági greiddi læknin annars frá, at í tann mun, sum íðkarar og ferðafólk vanliga gera nýtslu av heilivági, eiga tey at hava egnan heilvág við. Hetta er til dømis galdandi, um talan er um heilivág fyri hoyfepur, høvuðpínu og annað. Sølvi segði tað vera umráðandi, at fólk sjálvi høvdu tann heilivágin við, sum tey vóru von at nýta, og eisini helt hann tað vera eitt gott hugskot, um somikið nógv varð tikið við, at tað ikki ger nakað, um ferðin gest longri enn ætlað.

Annars vísti læknin eisini á, at tað í ávísum førum kann vera neyðugt at hava sonevnt Schengen-pass, fyri at hava heilivág við sær, og heitti hann á fólk um sjálvi at kanna hetta á apoteknum.

Sjúkrakassin

At enda vísti Sølvi á, at Sjúkrakassin hevur somu avtalu við Bretland, sum er galdandi fyri Norðanlondini. Tað vil siga, at um tað verður neyðugt at fólk mugu á sjúkrahús, so kemur hetta undir somu treytir, sum eru galdandi, tá farið verður á sjúkrahús í Føroyum.

Hann vísti tó á, at tað í hesum sambandi er alneyðugt, at viðurskifitini við Sjúkrakassan eru í lagi, at limagjald er goldið, eins og tað er ein fyrimunur at hava sjúkrakassanummarið við sær.

Vónandi verður ikki neyðugt at gera nýtslu av tí, sum nevnt er omanfyri, men hinvegin ger tað neyvan nakran skaða, um luttakararnir eru fyrireikaðir, soleiðis at at sleppast kann undan óneuyðugum trupulleikum, um óhapp skuldu borist at.

Kvívíkingar ætla at fáa sær nýggjan bát



Hóast 34 ára gamal, so var báturin úr Kvívík fremstur á málið hjá 8-mannaførunum, og sum vera man var frøin stór umborð, tá hetta varð greitt

Mynd: Álvur Haraldsen

Men í Fuglafirði varð staðfest, at tað framvegis ber til at vinna við gamla bátinum, sum nú er 34 ára gamal

8–MANNAFØR
Jóannes Hansen

Tað er ikki so langt síðani, at kvívíkingar tosaðu við bátasmiðin Sámal Hansen. Ørindini vóru at fáa hann at smíða teimum eitt nýtt 8–mannafar. Hann er ikki farin undir arbeiðið enn. Kvívíkingar arbeiða við fíggjarliga spurninginum, og teir rokna við, at tað verður heilt skjótt, at tað verður klárt.

At teir hava tosað um at fáa nýggjan bát kemst av, at teir halda, at gamli báturin er vorðin ov tungur. Kvívíkingar venja á Vestmanna. Kommunan eigur gamla nótaneystið á Válinum, sum jú hoyrir til Kvívíkar kommunu, og har stendur báturin.

– Undan stevnunum plaga vit at seta bátin inn í garaguna, sum kommunan eigur her í Kvívík. Har stendur hann so í tveir dagar og verður turkaður. Vit hava ikki vigað bátin, áðrenn hann fer í garaguna, og tá vit hava tikið hann út aftur, men tað er ein øgiligur munur á vektini. Tað kennist, tá vit lyfta og draga hann.

Hetta sigur Jóan Hendrik Isaksen, sum er formaður í róðrarfelagnum í Kvívík. Hann fegnast um sigurin hjá hansara monnum í Fuglafirði og heldur tað vera hugaligt, at teirra bátur, sum var flotaður fyrstu ferð í 1967, megnaði at vinna kappingina við nýggju bátarnar:

– Vit hava verið í einum aldudali í nøkur ár. Aðrir enn kvívíkingar hava roynt seg í bátinum. Tað hevur ikki roynst væl, og vit hava tikið ta avgerð, at um fólkið her á staðnum ikki var við til at manna bátin, so skuldi hann ikki flotast.

Umhugsa tit at sleppa ætlanini at fáa tykkum nýggjan bát?

– Vit gleðast um, at tað hevur hilnast so væl í ár. Teir, sum manna bátin, ganga høgt upp í tað, og vit hava roknað við, at tað skuldi eydnast í hvussu so er eina ferð í ár. Um vit fáa nýggjan bát, so verður møguleikin sjálvandi uppaftur størri, og tað ætla vit framvegis at gera.

Sóu Nevið Reyða

Tá startspurturin var liðugur í Fuglafirði bendi alt á, at tað skuldi tørna út, sum tað hevði gjørt á undanfarnu stevnunum. Nevið Reyða var fremstur, men á túsund metra málinum hevði Kvívíkingur, sum ikki hevði fingið nakran serligan start, hug at bjóða av, og mitt í róðrinum fór Kvívíkingurin frá Nevinum Reyða.

Nevið Reyða kom fram á aftur Kvívíkingin, og tá klaksvíkingarnir vóru teir fyrru at fara undir endaspurtin, gekk skjótt hjá teimum. Kvívíkingar svaraðu aftur, og á málinum var munurin ein skutur.

– Tá vit komu á mál visti eg ikki, at vit høvdu vunnið. Men mitt í róðrinum hevði eg eitt ánilsi av, at vit vóru fremstir, tí tá sá eg aftur á Nevið Reyða.

Hetta sigur Brynjolvur Petersen, sum er bátsformaður umborð á Kvívíkingi.

Onkur helt, at eldru og harvið tyngru bátarnir royndust betri, tí lotið var ímóti?

– Kanska er nakað um hatta. Men teir gomlu í Kvívík hava altíð sagt um okkara bát, at hann gekk best undan.

Teir umborð á Kvívíkingi eru millum 16 og 25 ára gamlir. Teir flotaðu bátin flaggdagin, og teir siga, at teir ikki høvdu gjørt nakað við venjingina frammanundan:

– Báturin var ikki mannaður fyrrenn 24. apríl, sigur bátsformaðurin.

Manningin á Kvívíkinginum er fyri ein part dreingirnir, sum í 1998 vunnu so sera nógv við Junkaranum. Rene Egilsnes er róðursmaður. Hann hevur áður verið við Junkaranum. Á lærinum eru tveir kollfirðingar, Regin Petersen og Jens Kristian Magnussen, sum báðir hava róð við bátunum í Kollafirði. So eru tað Ivan Forná, sum hevur verið við Junkaranum, og Bárður Isaksen, sum hevur verið sjómaður og tískil ikki hevur róð nakað serligt. Brynjolvur Petersen og Jógvan Petersen eru brøður, og teir hava báðir verið við Junkaranum. Á toftini eru Johan Müller og Jan Suni Hansen, sum eisini hava róð áður.

Argjabáturn megnaði hesa ferð at stríða seg fram á triðja plássið. Men enn tykist nógv resta í, áðrenn báturin, sum tey seinastu árini hevur vunnið so nógv, fer at blanda seg upp í stríðið um fremsta plássið. Tað vóru einar tvær bátslongdir frá teimum báðu fremstu og so aftur til Argjabátin.

gult21 cyan21 magenta21 svart21

Feløgini gera sjálvi róðrartalið av

Formaðurin í Róðrarsambandinum roknar við, at feløgini neyvan fara at hava somu áhugamál

KAPPRÓÐUR
Jóannes Hansen

Róðrarsambandið er felagsskapurin hjá róðrarfeløgunum. Tað, sum feløgini semjast um, verður broytt. Men spurningurin er, hvat feløgini kunnu semjast um. At róðrarfólk og róðrarfeløg vísa á broytingar, sum kunnu betra um kappróður er sera positivt og eitt gott grundarlag fyri framhaldandi viðgerð.

Tað er formaðurin í Róðrarsambandi Føroya, RSF, Hannis Joensen, sum gevur omanfyri standandi til kennar.

Fyri einari viku síðani segði Martin Venned, sum telist millum royndastu kappróðrarmenninar, og sum rør við Nevinum Reyða í ár, at hann helt at talið á kappróðrum átti at verið økt. Nú verður kappast í seks FM kappingum. Martin helt, at talið átti at verið hækkað, og hann vísti í tí sambandinum á, at tað er at undrast á, at tað ikki verður kappast á summum av teimum bestu róðrarøkjunum í landinum, tá havt verður í huga, at veður, vindur og streymur hava meiri at siga í kappróðrinum, enn teir hava í nakrari aðrari ítróttargrein.

Verður viðgjørt

Hannis Joensen, formaður í RSF, hevur ikki áður hoyrt sjónarmiðið, sum Martin Venned hevði um, at róðurin á síðstu bygdarstevnuni undan norðoyarstevnuni skuldi verið avgerandi fyri, hvussu bátarnir verða plaseraðir, tá teir skulu rógva í Klaksvík. Hetta heldur hann vera sera áhugavert.

Hannis Joensen sigur, at eitt uppskot er komið til Róðrarsambandið um at hækka talið á FM kappingum úr seks og upp í sjey, og at uppskotið fer at koma fyri á aðalfundinum hjá RSF, sum verður í heyst:

– Tað er Kappróðrarfelagið NSÍ, sum hevur sent RSF eitt skriv um hetta. Teir skjóta upp, at kappróðrarnir á eystanstevnuni og varmakeldustevnuni telja við í FM kappingini á hvørjum ári. Sum kunnugt so hevur tað higartil verið soleiðis, at róðurin í Fuglafirði hevur talt við aðru hvørja ferð, og at róðurin á Skálafjørðinum hevur talt við aðru hvørja ferð.

Roknar tú við, at uppskotið fer at verða samtykt?

– Tað hevði verið rættari, um tað ikki bara vóru teir á Skálafjørðinum, men eisini teir í Fuglafirði, sum høvdu skrivað undir áheitanina ella uppskotið. Fuglfirðingar mugu eisini vera við uppá tað, um tað verður avgjørt, at teirra róður skal telja við á hvørjum ári, men tað ivist eg ikki í, at teir gera, sigur Hannis Joensen, og hann heldur fram:

– Uppskotið var komið til RSF, tá vit í februar vóru á eykaaðalfundi. Málið var ikki á skránni, men dýpið varð loddað, og tað vóru fleiri feløg, sum tóku undir við uppskotinum.

Ymisk áhugamál

Í síðstu viku sammetti Martin Venned her í blaðnum kappingina í róðrinum og fótbóltskappingina. Hann vísti á, at bæði kappróðrarfólkið og fótbóltsspælararnir venja frá stutt eftir ársskiftið, men meðan fótbóltsspælararnir kappast í átjan umførum í landskappingini og harafturat spæla nógvar dystir í steypakappingini, so er kappingartalið hjá kappróðrarfólkunum nógv meiri avmarkað. Talan er um seks FM róðrar og so onkrar róðrar á bygdastevnum. Martin helt, at nógva venjingin átti at verið so at siga lønt við fleiri FM kappingum. Í hesum sambandi vísti hann á, at t. d. samferðsluumstøðurnar eru so mikið batnaðar, tá sammett verður við tíðina, tá stevnutalið varð ásett, at tað ikki longur er nøkur forðing fyri fleiri kappróðrum, og hann helt, at tað átti at verið umhugsað, um kappróðurin altíð skal verða knýttur at summarstevnunum.

Hvat heldur formaðurin í RSF um tað?

– Eg eri púra samdur við Martini í, at umstøðurnar eru nógv broyttar. Tá vit róðu fyrrapartin av sjeyti árunum var ferðingin ein stórur trupulleiki. Eg minnist onkra ferðina, at Dagstjørnan, sum røkti vaktarhald undir Føroyum, kom inn fyri at flyta kappróðrarbátar, og at vit løgdu plangar lúnning av lúnning fyri at fáa pláss til bátarnar. Í so máta er nógv broytt, og samferðslan er ikki longur nøkur forðing fyri fleiri kappingum.

Hannis Joensen undirstrikar enn eina ferð, at tað eru feløgini, sum gera av, hvussu nógvar kappingarnar skulu vera. Hann vísir á, at um feløgini gera av at hækka talið til t. d. átta ella níggju róðrar, so verður neyðugt at leingja róðrarárið, tí tað skal vera møguleiki fyri at hava í hvussu so er eitt vikuskifti til at taka. Tað er komið fyri, og tað kann framvegis koma fyri, at tað orsaka av vánaligum veðri ikki verður møguleiki fyri at rógva bæði leygardag og sunnudag, og so siga reglurnar, at tað skal roynast av nýggjum eitt annað vikuskifti.

– Men um viljin er til at broyta hetta, so ber tað til. Spurningurin er, hvussu tað verður við viljanum. Eg rokni við, at áhugamálini hjá feløgunum eru sera ymisk. Í feløgunum, har tað er nógv lív í, og hjá teimum, sum tað er høgligt at koma til ymsu róðrarøkini, verður áhugin heilt víststørri at hava fleiri kappingar, enn hann verður í feløgum, har tað so at siga akkurát ber til, soleiðis sum tað nú verður kappast, heldur formaðurin í RSF, sum enn eina ferð undirstrikar, at tað er sera hugaligt, at róðrarfólk koma við konstruktivum uppskotum um, hvussu kappróðurin kann gerast uppaftur meiri áhugaverdur, enn hann er í løtuni.



Formnaðurin í RSF sigur, at tað eru feløgini sjálv, sum avgera talið av FM-róðrum. – Siga tey átta ella níggju róðrar, so verður neyðugt at leingja róðrarárið

FM-støðan

Niðanfyri verða støðurnar í FM-kappingini í kappróðri prentaðar.

5-mannafør dreingir	Hesaferð	Samanlagt
1 Tjaldrið	5	19
2 Sílið	7	13
3 Blikur	2	12
4 Fípan Fagra	4	9
5 Frúgvin	3	9
6 Havfrúgvin	1	4

6-mannafør kvinnur		
1 Páll Fangi	7	21
2 Sølmundur	4	14
3 Jarnbardur	5	12
4 Víkingur	2	7
5 Leirvíkingur	3	5
6 Gongurólvur		5
7 Fortuna	1	1
8 Hvessingur		1

5-mannafør gentur		
1 Fípan Fagra	7	21
2 Sílið	5	15
3 Blikur	4	12
4 Tjaldrið	3	9
5 Ørnin	1	4
6 Drekin	2	2
7 Hvassi		2
8 Frúgvin		1

6-mannafør menn		
1 Strálan	7	19
2 Sølmundur	5	16
3 Riddarin	4	13
4 Hvessingur	3	9
5 Snopprikkur		4
6 Fortuna	2	2
7 Páll Fangi		2
8 Gongurólvur	1	1

8-mannafør		
1 Nevið Reyða	5	19
2 Kvívíkingur	7	15
3 Knørrur	3	13
4 Argjabáturin	4	10
5 Ormurin Langi		4
6 Ørvur	1	3
7 Heiðabáturin	2	2

10-mannafør		
1 Havnarbáturin	7	21
2 Eysturoyingur	5	13
3 Vestmenningur	3	13
4 Nólsoyingur	4	9
5 Skálabáturin	2	7
6 Suðuroyingur	1	2